# Trífald gleði

**Mánadagin fingu Bjørg Danielsen og Karl Erik Sigvardsson tríburðar. Tveir dreingir og eina gentu, sum øll komu í verðina í øllum góðum og hava tað gott**



*Ein familja sum øktist munandi mánadagin*

*Mynd: Jens K. Vang*

TRÍBURAR

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Um hálvgum trý tíðina seinnapartin mánadagin sóu tríggir nýføðingar dagsins ljós fyri fyrstu ferð. Felags fyri allar tríggjar er, at teir hava eina og somu mammu. Nýføðingarnir eru tríburðar, og tað er ikki á hvørjum degi, at slík stórhending fer fram.

Mamman, Bjørg Danielsen, sigur, at tað hevur gingið framúr undir barnsburðinum.

– Sjálvandi hevur tað verið munandi tyngri at borið trý børn, men eg má siga, at eg havi havt tað sera gott undir øllum barnsburðinum, sigur ein ovurfegin Bjørg.

Hon átti tríburðarnar í 35. viku, men hóast tað eru øll trý væl fyri. Tey vigaðu millum 1.850 og 2.400 gram, og má tað sigast at vera avbera gott fyri tríburðar.

Tey fingu at vita, at hon bar tríburðar, tá hon fór til skanning í 18. viku. Bjørg sigur, at sjálvandi fekk hon ein skelk, tí ongin gongur og væntar, at man fær tríburðar. Men tað tók ikki langa tíð, til hon hevði vant seg við tankan.

– Tað hevur helst verið nakað trongligt hjá teimum, tí her hevur ikki verið so nógv meira lív enn tá bara eitt er, sigur Bjørg og smílist.

Bjørg og Karl Erik eiga framman undan tvey børn, sum eru ávíkavist 15 og seks ára gomul.

Øll eru spent at fáa Bjørg og tríburðarnar heim av sjúkrahúsinum. Bjørg veit ikki rættuliga, nær tað verður, men helst skjótt, væntar hon.

Sosialurin ynskir teimum hjartaliga til lukku og alt tað besta í framtíðini.

## VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av vestri og útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men um kvøldið møguliga regn. Hitin millum 7 og 10 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og regn av og á. Út á seinnapartin lot av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fleyr til gul av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av útnyrðingi og norði og yvirhøvur turt og sólglottar, men sunnukvøldið veksur hann væntandi vindin av landnyrðingi og ælingur. Hitin millum 11 og 15 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 7 |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 10 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 17 |
| Tromsø | 18 |
| Bergen | 15 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 18 |
| Keypmannah. | 16 |
| Helsinki | 15 |
| Moskva | 13 |
| Berlin | 19 |
| Warzawa | 19 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 26 |
| Paris | 16 |
| Madrid | 32 |
| Róm | 26 |
| Malorca | 28 |
| Athen | 32 |
| Malta | 31 |
| Tunis | 30 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 18 |
| New York | 27 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | – |
| La Paz | 8 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 16 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 1000 hPa. í landnyrðing úr Føroyum grynnist. Eitt annað lágtrýst, 1002 hPa. við Hvarvið fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum hósnáttina.




Lágtrýstið yvir Íslandi fer spakuliga eystureftir og brúgvalagið haðani fer í landsynning.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 04/07 kl. 06[00]–05/07 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 10°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 04/07 kl. 06[00]–05/07 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juli: 12,9 mm

Sosialurin
www.sosialurin.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

1. juli: Mánin næstur jørðini
2. juli: Fullmáni
5. juli: Jørðin longst frá sólini
9. juli: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. juli | 11.44 | — | 10.44 | 23.05 | 10.59 | 23.20 | 01.21 | 13.44 | 02.21 | 14.44 | 09.59 | 22.20 | 08.59 | 21.20 | 11.59 | — | 00.36 | 12.59 | 11.29 | 23.50 | 00.21 | 12.44 |
| 8. juli | 00.05 | 12.27 | 11.27 | — | 11.42 | — | 02.05 | 14.27 | 03.05 | 15.27 | 10.42 | 23.16 | 09.42 | 22.16 | 00.20 | 12.42 | 01.20 | 13.42 | — | 12.12 | 01.05 | 13.27 |
| 9. juli | 01.01 | 13.36 | 00.01 | 12.36 | 00.16 | 12.51 | 03.01 | 15.36 | 04.01 | 16.36 | 11.51 | — | 10.51 | 23.25 | 01.16 | 13.51 | 02.16 | 14.51 | 00.46 | 13.21 | 02.01 | 14.36 |
| 10. juli | 02.10 | 14.44 | 01.10 | 13.44 | 01.25 | 13.59 | 04.10 | 16.44 | 05.10 | 17.44 | 00.25 | 12.59 | 11.59 | — | 02.25 | 14.59 | 03.25 | 15.59 | 01.55 | 14.29 | 03.10 | 15.44 |